

**ERHARD POULSEN, EI‹I, 79 ÁR:**
Ta› er kappró›urin, og onki anna› tiltak, i› dregur gamla bátasmi›in á Ei›i su›ur á Skálafjør›in at halda Eystanstevnu.

– Eg havi skyldfólk allasta›ni kring Føroyar. So ta› ver›ur ikki nakar trupulleiki at finna onkran at vitja á Eystanstevnu. Men eg má bara siga, at gott er at hava onkran at koyra seg, tí eg havi veri› so lamin í seinastuni, sigur Erhard.

Tí›ina, hann var virkin sum bátasmi›ur, bygdi hann einar 60 bátar, men ongin teirra var kappró›rarbátur. Erhard bygdi størri bátar til útró›ur. Men hann hevur kortini havt eitt vaki› eyga› vi› n‡ggju kappró›rarbátunum, sum eru mangir í tali hetta kappingarári›. Og handverkinum bagir onki, er ni›urstø›an hjá honum.

# NSÍ setir føtur í bekk



*Ró›rarveteranurin Assved Djurhuus og forma›urin í Ró›rarfelagnum NSÍ, Sofus Hansen, vi› soninum í kneppinum*

*Kappró›rarfelagi› NSÍ er blivi› størsta ró›rarfelag í landinum. Vi› n‡ggjum bátum og n‡ggjum neysti eru umstø›urnar og vónirnar betri enn nakrantí›. Nú vanta bert útslitini*

DÁNJAL HØJGAARD

Sjálvsáliti› er í toppi.

-Kappró›urin blómar. Vanliga hava vit bara havt 2-3 manningar. Nú hava vit 9 manningar . Manningarnar telja tilsamans 71 fólk og vit eru sostatt størsta kappró›ararfelag í landinum í ár, sta›festir Sofus Hansen, forma›ur í felagnum.

Kappró›rarfelagi› NSÍ er fari› undir eitt n‡tt kappró›rarár vi› gó›um treysti. Tali› á virknum ró›rarfólki hevur ikki veri› størri í fleiri ár.

## Tvey gó› ár

Ta› byrja›i á Nor›oyarstevnu í 1998, tá i› 10- mannafari› Eysturoyingur vann tann fyrsta av mongum sigrum. Teir vunnu allar ró›rarnar í 1998 og 1999, og ta› var ikki fyrr enn á Nor›oyarstevnu í ár, at teir vóru ste›ga›ir.

Sofus Hansen sigur, at áhugi hevur veri› altí› fyri kappró›ri í økinum, Hóast ta› hevur gingi› upp og ni›ur, so hevur altí› onkur gulur bátur vi›.

Sigrarnir hjá Eysturoyingi góvu áræ›i og bló› á tonnini, og fólk fylkjast um felagi›, sum ongantí› á›rur, sigur forma›urin.

## Trongt í neystinum

Seinastu tvey árini hava heilt bókstaviliga veri› ein uppbyggingartí› hjá felagnum.

Sofus Hansen vísir okkum n‡ggja neysti› á Glyvrum, sum er fult av bátum. Í løtuni eru 6 virknir bátar í felagnum. Neysti› er bygt til f‡ra bátar, men teir hava fingi› fimm bátar inn um. Tann sætti stendur í eini bingju í eini privatum neysti beint innanfyri neysti› hjá ró›rarfelagnum hjá NSÍ.

Neysti› á Glyvrum er longu blivi› ov líti›.

-Neysti› er ov líti›, men ta› fáa vit einki gjørt vi› fyribils, sigur Sofus Hansen, sum fegnast um, at felagi› endiliga hevur fingi› gó›ar umstø›ur at virka undir.

## Fylkjast um felagi›

N‡ggja neysti› er 180 fermetrar í tveimum hæddum.

Í ni›aru hæddini standa kappró›rarbátarnir á ra›. Ovara hæddin er ikki li›ugt innrætta› enn. Men har er ætlanin av hava brúsur og umklæ›ingarrúm, umframt ein sal, sum kanska skal leigast út.

Møguliga ver›a ró›rarmaskinur settar upp í neystinum, so at ró›rarfólki› eisini kann venja um veturin, sigur Sofus Hansen.

Runavíkar kommuna hevur veri› vi› til at fíggja neysti›, og peningur er komin inn vi› tiltøkum. Harafturat liggur nógv sjálvbo›i› arbei›i í n‡ggja neystinum, og millum teirra, sum hava tiki› eina hond í eru eisini gomul kappró›rarfólk.

- Okkurt kvøldi› hava vit veri› einir 10 eldri menn her í neystinum, sigur pensjonera›i kappró›rarma›urin Assved Djurhuus úr Søldarfir›i.

Assved Djurhuus fegnast um, at lív er komi› í felagi› aftur. Fleiri av teimum gomlu vóru farnir úr felagnum, men nú hava teir melda› seg inn aftur.

## Gó›ar vónir

Higartil hevur kappró›rarári› 2000 ikki veri› naka› at reypa av hjá teimum gulu á eystara armi á Skálafir›i.

Á Nor›oyarstevnu kom flaggskipi› Eysturoyingurin á mál sum nummar 4 av seks bátum. Ta› spildurnn‡ggja Tjaldri› bjarga›i kortini hei›urin hjá NSÍ. Hann var tann einasti av teimum gulu bátunum, sum kom fyrstur á mál.

NSÍ-ararnir eru kortini vi› sera gott mót. Teir vóna, at gó›u umstø›urnar og undirtøkan, felagi› hevur vunni› sær nú, fara at síggjast aftur í hei›ursmerkjum.

Fyri Assved Djurhuus stendur Vestanstevnan í Sørvági í 1962 sum ein tann stórsta hendingin í ró›rarsøguni hjá NSÍ, sum ikki longur bert er ein deild av mó›urfelagnum NSÍ, men er eitt sjálvstø›ugt felag.

Á Sørvágsfir›i vunnu allir teir gulu bátarnir av Skálafjør›inum. Assved vónar sjálvandi, at hetta fer at henda einafer› aftur at.





**PEDDY HØJGAARD, TOFTIR:**
-Eg haldi Eystanstevnuna mest fyri kappró›urin. Eg eri eisini vi› í fimleikarfelagnum Støkk, og vit fara at skipa fyri dansi í Støkk-høllini leygarkvøldi›.

-Eystanstevnan er best, tá i› FM telur. Tá er meira fólk og lív í b‡num. Ta› hev›i veri› best, at FM-ró›ur var á Skálafjør›inum á hvørjum ári.

# Mála b‡in hvítan

*B‡urin ver›ur snolla›ur upp, nú Eystanstevnan stendur fyri durum. Fólk hava rudda› og hampa› um gar›arnar og málingakustarnir hava veri› á lofti*

Mynd: Jens Kr. Vang



DÁNJAL HØJGAARD

Uttanfyri n‡ggja handilin Hjá Fró›a á Høgabóli í Saltangará standa tveir skemtingarsamin málarar uppi í einum stiga.

Ey›un Jacobsen og Jan Nónklett eru í fer› vi› at mála n‡ggja handilsbygningin, sum fyritøkan Hjá Fró›a hevur keypt nærhendis havnarlagi›.

-Vit hava ótruliga nógv at gera. Um ta› er stevnan, i› ger ta›, veit eg ikki, sigur Ey›un.

-Ta› eru bæ›i virkir, privathús og handlar, sum hesin. Eg vænti, at meistarin torir ikki at siga ja til fleiri uppgávur, sigur Ey›un.

-Hyggur tú teg um sært hvussu fólk eru farin út at snøgga um, bæ›i í gar›inum og sjálvi húsini.

-Kommunan hevur skipa› fyri ruddingardegi og børn og ung hava gingi› og feia› og rudda›, sigur hann.

## Hvítt, svart og reytt

Hendan dagin mála›u teir hvítt hjá Fró›a. Hvítt omaná gult - væl at merkja. Vit spurdu hvør Eystanstevnuliturin er hesafer›.

-Man hann ikki vera gulur, skemtar Ey›un.

-Man ta› ikki vera gult og svart, hóast vit nú standa og mála hvítt omaná gult. Solei›is er ta›, tá i› havnarmenn koma inn higar. Havnarbáturin er hvítur. Kanska er ta› tí, at hann (Fró›i, red) vil hava bygningin hvítan, sigur hann.

Teir bá›ir málararnir ætla kortini ikki at mála b‡in rey›an á Eystanstevnuni.

-Nei eg røri› ikki sovor›i›, er Ey›un kvikur at svara. Hann sipar til rúsdrekka.

-Fyri mítt vi›komandi fer stevnan at snúgva seg um ta› andaliga, slær hann fast.

Og Jan, sum spælir á 1. deildarli›num hjá NSÍ fer heldur ikki út at mála reytt:

-Nei, ta› rokni eg ikki vi›. Eg fari til Su›uroyar og stevnan fer mest at snúgva seg um fótbólt.

Sambært Skálafjar›a Málingahandli í Saltangará er ta› annars ógvuliga sannlíkt, at húsini ver›a mála› rey› til hesa Eystanstevnuna. Heldur enn gul.

Høvu›slitirnir til hús í ár eru - eins og undanfaru ár - hvítt, svart og reytt, uppl‡sir handilin.

# Vín vinnur á Vodka

*RÚSDREKKASØLAN. Ví›gitni kassamentaliteturin er vi› at fara í søguna. Eysturoyingum, sum støkka inn á gólvi› á Rúsuni í Runavík, líkar væl vodka og øl, men teir hava eisini av álvara fingi› ans fyri rey›víni*

Mynd: Jens Kr. Vang




*Caberet Sauvignon víndrúvan fellur føroyingum væl, tá i› teir velja sær vín. Bleyta kalifornska rey›víni› frá 1997, sum Frí›bjørg Weihe, starvsfólk í Rúsuni í Runavík, gevur besta vi›mæli, kostar 81 krónur. Víni› er longu drekkibúgvi›. Ta› hevur gó›an og fruktríkan smakk vi› me›al fyllu og mildan vaniljuanga. Hetta víni› ver›ur hildi› at hóska serliga væl til lættar kjøtrættir og ljósan flogfena›, ella afturvi› einari broysknari ostakeks*

HØGNI MOHR

Lítil ella ongin broyting hómast í keypsvanunum á Rúsdrekkasølu Landsins í Runavík, nú ta› stundar til Eystanstevnu. Sølan økist eitt sindur, men ta› ber als ikki til at siga, at einkarsølan har á sta›num ver›ur runnin um koll av tystum sálum.

## Rusdrekkalógin virkar

Drekkivanarnir í Eysturoynni eru sambært starvsfólkini á Rúsdrekkasøluni broytt munandi, sí›ani n‡ggja rúsdrekkalógin kom í gildi› í 1992. Akvavitti› var nógv mest selda brennivín, men nú hevur vodka, serliga av slagnum, Smirnoff, yvirhála› donsku tjó›ardroparnar.

Tey ungu eru eisini vor›in meira hóvlig í sínum innkeypi. Ta› er púra vanligt at koma inn og keypa sær eina hálva fløsku og kanska seks øl, av tí veikara slagnum, afturvi›. Kassamentaliteturin er eftir øllum at døma vi› at fara í søguna. Og prosentini hava minni t‡dning enn á›ur.

## Á smakkiskei›i

Eysturoyingum dámar væl amerikanskt Vodka og føroyskt øl. Men víni› vinnur størri og størri part av søluni. Serliga ta› rey›a víni›, sum hevur fingi› pláss á longstu hillini í hølunum hjá Rúsdrekkasøluni í Runavík.

Starvsfólkini á Rúsdrekkasøluni, f‡ra konufólk, eru ikki avhaldsfólk. Serliga væl hóvar teimum at fáa sær eitt glas av gó›um rey›víni. Og hesum gó›a drykki hava tey gott skil á. Tey hava júst veri› á vínsmakkingarskei›i, og eru tískil betur før fyri at veglei›a óroyndum vi›skiftafólkum, sum ikki vita, hvørji endamál mongu ymisku sløgini hóska best til.